# Ítróttavitjanir






Venjingarlegur
Síða 2




Venjingarlegur
Síða 3




Kappingar / Fundir
Síða 4



Ítróttargreinar
Síða 5



Ítróttaøki
Síða 6 og 7

Gestir okkara
Síða 8



# Venjingarlegur

Vit gleða okkum til at bjóða tykkum at vera vælkomin til sólríkar dagar við bæði spennandi og avbjóðandi venjingum og kappingum eins væl og sosialum upplivingum.

Vit hava fasilitetir og venjarar til flestu ítróttagreinar. Uttan mun til tykkara ítrótt, kunnu vit tí seta saman eina góða og mennandi skrá saman við tykkum.

**Sí nakrar av ítróttum okkara á síðu 4.**

**Ein venjingarlega fevnir vanliga um**

- Venjingar á okkara ítróttaøkjum (við sponskum venjarum, um tað hevur áhuga)
- 1 ella 2 vinardystir ella kappingar
- Vatn í sambandi við alt ítróttavirksemið
- Aðrar aktivitetir til menning ella stuttleika (sum møguligt tilval)
- Vakrar og spennandi útferðir (sum møguligt tilval)

















# Venjingarlegur

## við familjuferiu!




Ein sera vælumtókt tænasta, sum fleiri hundrað gestir longu hava valt at njóta, er tilboðið til familjur um at koma við liðunum og stuðla teimum, samstundis sum tær kunnu taka sær av løttum – og viðhvørt eisini stytta sær stundir við fótbólti, flogbólti og øðrum aktivitetum.

Viðhvørt spæla dreingirnir ella genturnar dyst móti venjarum og foreldrum, og stundir eru eisini til at bæði fótbólts-spælarar og avvarðandi kunnu uppliva ymiskt saman.






solorka




# Kappingar

Spania er rætti verturin, tá tað snýr seg um altjóða kappingar. Afturat tí fullkomna heilársveðurlagnum eiga spaniólar ríkar siðvenjur innan flestu ítróttagreinar – og samsvarandi nógv úrslit og meistaraheiti at visa á. Tí tekna nógv av teimum bestu altjóða liðunum seg til kappingar í Spania.

Vit umboða nakrar av sponsku kappingunum. Harafturat kunnu vit saman við royndum samstarvsfelagum skipa fyri skraddaraseymaðum kappingum. Uttan mun til, hvørji ítróttagrein, tit kappast í, kunnu tit tí altíð spyrja tykkum fyri.



# Ráðstevnur, fundir, skeið o.a.



Costa Blanca er ein frálíkur karmur kring ráðstevnur, fundir, skeið o.t.l. Her er lagamanni at knýta saman tað fakliga og aðrar upplivingar.

Vit hava fyrstafloks innandura og uttandura fasilitetir í vøkrum umhvørvi og góðum veðri.

Á vetri ber eisini til at vitja okkum á Gran Canaria.


















# Ítróttagreinar

Spania skarar framúr innan næstan allar ítróttagreinar. Vit hava fasilitetir og venjarar til at kalla alla ítrótt. Uttan mun til tíni ynski kunnu vit tí seta saman eina ætlan saman við tær.

Vit kunnu skipa fyri eini fulltíðarskrá innan eina grein, ella vit kunnu seta tína ítróttagrein saman við onkrum styttri skeiði (t.d. í eina hálvan dag) innan onkra heilt aðra grein, so tú fært eina spennandi uppliving framíhjá.

Vit skipa eisini fyri **‘multi-sport’**-skráum, har tað ber til at taka lut í hálvdags-skeiðum innan nógvar ymiskar ítróttagreinar.





























# Costa Blanca á vári og heysti

Í sólorkuøkinum hava vit ítróttafasilitetir í heimsflokki við nútímans vøllum, hallum og hentleikum annars. Vit hava nógvar fótbóltsvøllir við ávikavist grasi og graslíki. Vit hava góð øki til tennis, padel, padbol og aðrar ítróttir umframt hallir til alla innanduraítrótt.

Vit eru harafturat í einum teimum vakrastu og best umtóktu súkklulendunum í øllum Europa. Strendur, flatlendi, landbúnaðarøki, heyggjar og fjøll draga at sær fremstu súkklarar í heiminum. Bæði Tour-de-France- og Vuelta-a-España-súkklarar venja her.

Umframt tað hava vit okkara egna vatnland og hópin av øðrum hentleikum á Albir Garden-resortinum.

Og so eru møguleikarnir fyri vøkrum og spennandi útferðum – bæði á bygd og í býi – nærum ótaldir.

Partar av árinum hava vit beinleiðis flúgving við okkara egnu leiguflogførum millum Vágar og Alicante.









# Gran Canaria á vetri

Kanariska oyggin hevur eitt sera javnt vetrarveður við lýggjum veðri, sum ger hana til eitt vælegnað stað at vitja tann partin av árinum, tá europeiski veturin kann finna uppá at spæla hund.

Er áhugi fyri venjingarlegum, ráðstevnum ella skeiðum uttan fyri kappingarárið hjá summarítróttini, ber til at vitja okkum á Gran Canaria í januar ella februar.

Her hava vit m.a. møguleikan fyri venjing í San Augustin við gisting á hotellinum Don Gregory ella í Puerto de Mogán við gisting á tí nýggja Radisson Blu.

Eisini her kunnu vit skipa fyri vøkrum útferðum – eitt nú til holubúgvarnar í Guayadeque ella kaffiplantasjurnar í bergtakandi Agaete-dalinum.




sólorka

# Nakrir av gestum okkara

- B68
- NSÍ
- PARASPORT FØROYAR
- SVIMJIFELAGIÐ ÆGIR
- HAVNAR SVIMJIFELAG
- FIMLEIKAFELAGIÐ STØKK
- FRÆLSUR ÍTRÓTTUR FØROYA
- KÍ
- NIPPON UK MARTIAL ARTS
- UNIV. OF CENTRAL LANCASHIRE
- PRESTONS COLLEGE
- UNIVERSITY OF PARDUBICE
- MSK KARATE
- MOORSIDE HIGH SCHOOL
- FUGLAFJARÐAR SVIMJIFELAG
- BURY FC
- MANCHESTER CITY FC
- ELITE ACADEMY LIVERPOOL
- VESTSJÆLLANDS IDRÆTSEFTERSKOLE
- BISHOPS RAWSTORNE